FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF FINANCE

Tórshavn, 20. februar 2023
Málsnr.: 21/07135

Fylgiskjal 1

Hoyringsnotat

viðvíkjandi uppskoti til løgtingslóg um Mínboks

Uppskot til løgtingslóg um Mínboks varð lagt til hoyringar tann 16. januar 2023. Freistin at koma við viðmerkingum var 13. februar 2023.

Hoyringssvar er komið frá:

- Almanna- og mentamálaráðið
- Almannaverkið
- Dátueftirlitið
- Deyvafelag Føroya
- Etiska ráðið
- Heilsumálaráðið
- Landssjúkrahúsinum
- Kommunufelagnum
- KT-felagnum
- MEGD
- TAKS
- Vísindasiðseminevndin

Sum úrslit av hoyringini eru gjørdar nakrar broytingar í lógaruppskotinum. Mest týðandi er, at:

- Kravið um, at almennir stovnar skulu nýta Mínboks, um hesir senda viðkvæmar persónsupplýsingar ella trúnaðarupplýsingar, er strika, tvs. at § 3, stk. 2-4 er tikið úr. Hoyringssvarini vístu, at tíðin var ikki búgvin til hesa áseting.
- nýggj grein er sett inn, ið nágreinar dátuábyrgdarbýtið í samband við viðger av persónsupplýsingum.

Harumframt er § 2, nr. 5) orða á annan hátt, men týdningurin er hin sami. Eisini eru fleiri nágreiningar gjørdar í viðmerkingunum, har hoyringsvarini vístu á, at okkurt ikki var nóg skilligt.

Niðanfyri er ein samandráttur av hoyringssvarunum frá ymisku pørtunum. Viðmerkingar frá Fíggjarmálaráðnum eru skrivaðar við *skákskrift.* Fyri at síggja hoyringssvarini í fullum líki, verður vísst til sjálv hoyringssvarini, ið eru viðløgd sum fylgiskjal til hetta hoyringsnotat.

Almanna- og mentamálaráðið

Lógaruppskotið setir sum krav, at almennir stovnar skulu samskifta umvegis Mínboks, tá tey senda viðkvæmar persónsupplýsingar ella trúnaðarupplýsingar talgilt til síni viðskiftafólk.

Sum Fíggjarmálaráðið vísir á, er neyðugt, at borgarar hava Samleikan fyri at rita inn í Mínboks. Samleikin er persónligur, og kann hetta verða ein forðing fyri persónar, ið eitt nú eru undir verju ella tørva hjálp frá starvsfólki ella avvarðandi, tí hesi kunnu ikki rita inn vegna borgaran. Eisini eru aðrar avbjóðingar fyri fólk, ið hava trupult við at brúka talgilt samskifti, sum neyðugt er, at lógin tekur atlit til.

Fíggjarmálaráðið:
Kravið í § 3, stk. 2 um, at almennir stovnar skulu samskifta umvegis Mínboks, tá tey senda viðkvæmar persónsupplýsingar ella trúnaðarupplýsingar talgilt til síni viðskiftafólk, er strika úr lógaruppskotinum.

Mínboks hevur í dag fulltrúloysn, har verjar og onnur avvarðandi kunnu fáa atgongd til at lesa og senda teldupost hjá einum øðrum borgara. Eftir ætlan vera fleiri betringar framdar av hesi fulltrúloysn komandi tíðina.

Almannaverkið, og aðrir stovnar undir Almanna- og mentamálaráðnum, veita tilboð, tænastur og veitingar til fólk við serligum tørvi. Umframt formligt samskifti, hava hesi dagliga tørv á at samskifta við borgaran um teirra viðurskifti. Hesir borgarar fáa veiting ella tænastu orsakað av at tey hava serligan tørv, og tí er størsti parturin av samskiftinum viðkvæmt.

Mett verður at hesir stovnar við hesum lógaruppskoti fara at hava munandi truplari við at samskifta við borgaran. Hetta fer at ávirka tænastustøðið og gera tað truplari hjá Almannaverkinum at halda upplýsingar- og ráðgevingarskylduna.

Fíggjarmálaráðið:
Kravið í § 3, stk. 2 um, at almennir stovnar skulu samskifta umvegis Mínboks, tá tey senda viðkvæmar persónsupplýsingar ella trúnaðarupplýsingar talgilt til síni viðskiftafólk, er strika úr lógaruppskotinum.

Sæð frá einum KT-trygdarsjónarhornið eigur at vera umhugsað, um tað er møguligt at eyðmerkja ein móttakara á nøktandi hátt, tá ið sent verður til teldupostskipanirnar sum Hotmail og Gmail.

Almannaverkið

Borgarar og Almannaverkið nýta teldupostsamskifti til skjótt og smidligt samskifti, har skjótt svar væntast. Almannaverkið móttekur munandi fleiri teldupostar frá borgarum enn telefonuppringingar

á høvuðsnummarið. Við hesum uppskoti verður Almannaverkið í stóran mun avmarkað í sínum samskifti við borgarar, av tí at alt samskifti framyvir skal í Mínboks, og tað óformliga samskifti, sum í dag gongur fyri seg umvegis teldupost, framyvir annahvørt skal gerast umvegis telefon ella vanligan post.

Almannaverkið metir, at uppskotið í stóran mun fer at ávirka tænastustøði hjá Almannaverkinum, av tí at tað verður truplari hjá borgarum at samskifta við Almannaverkið. Avleiðingin verður ein bæði longd og tyngri málsviðgerðartíð, og at Almannaverkið fær truplari við at halda upplýsingar- og ráðgevingarskylduna.

Fíggjarmálaráðið:
Kravið í § 3, stk. 2 um, at almennir stovnar skulu samskifta umvegis Mínboks, tá tey senda viðkvæmar persónsupplýsingar ella trúnaðarupplýsingar talgilt til síni viðskiftafólk, er strika úr lógaruppskotinum.

Sæð frá einum KT-trygdarsjónarhornið eigur at vera umhugsa, um tað er møguligt at eyðmerkja ein móttakara á nøktandi hátt, tá ið sent verður til teldupostskipanirnar sum Hotmail og Gmail.

Dátueftirlitið

Viðv. § 4 - Dátueftirlitið mælir til, at lækka aldursmarkið til 13 ár eins og á Samleikanum. Við at broyta aldursmarkið, kunnu tey sum eru 13 ella 14 ár eisini hava møguleikan at móttaka viðkvæmar persónsupplýsingar og trúnaðarupplýsingar umvegis Mínboks.

Fíggjarmálaráðið:

Mett verður, at skipanin ikki er búgvin til at lækka aldursmarkið enn, serliga er tørvur á nærri útgreinan av, hvørjar løgfrøðiligar, praktiskar og tekniskar avbjóðingar hetta hevur við sær. Mínboks eigur fyrst at verið útbygt soleiðis, at foreldur hava møguleika, at síggja postin hjá sínum 13 og 14 ára gomlu børnum, áðrenn aldursmarkið verður koyrt niður á 13 ár.

Dátuábyrgdari og dátuviðgeri - Tað eigur at verða umhugsað, at áseta, hvør er dátuábyrgdari og dátuviðgerði, so eisini at áseta at landstýrismanninum verður heimilað at áseta nærri reglur um ábyrgd, uppgávur og eftirlit í sambandi við, at Gjaldstovan/Talgildu Føroyar viðgera persónsupplýsingar vegna teir ymsu dátuábyrgdarnar ið brúka Mínboks skipanina.

Fíggjarmálaráðið:

Fíggjarmálaráðið tekur hetta til eftirtektar og hevur, við støði í viðmerkingunum í hoyringsskrivinum og í telefonsamrøðu við Dátueftirlitið, dagført lógaruppskotið við áseting um dátuábyrgdara og dátuviðgera.

Harumframt verður broytt í viðmerkingunum, at viðgerðargrundarlagið fyri viðgerðini av persónsupplýsingunum í samband við umsiting av Mínboks verður § 8, nr. 5) um almenna myndugleikaútinnan og ikki samtykki.

Deyvafelag Føroya

Viðv. § 8: Deyvafelag Føroya ynskir at allar skrivaðar vegleiðingar í "Mínboks" verður týddur til føroyskt teknmál og lagdur út sum filmur , soleiðis at teknmælt kunnu fáa somu vegleiðingar sum tey, ið lesa tekst. Í øðrum lagi ynskir Deyvafelag Føroya at ein " lætt lesilig" útgáva av teksti/vegleiðingum, verður atkomulig til teir brúkarar, ið hava tørv á tí.

Fíggjarmálaráðið:

Vegleiðingar hjá Talgildu Føroyum verða altíð skrivaðar so lætt lesiligar, sum til ber. Videovegleiðingar hava eisini føroyskan og enskan undirtekst.

Tað eru ikki nógvar skriftligar vegleiðingar. Vangin, sum hýsir Mínboks, brúkar heldur smáar hjálpitekstir runt um í Vanganum, so hjálpin er júst har, ið tú hevur brúk fyri henni. Talgildu Føroyar leggja sær nær, at skriva við góðum málburði, sum allir brúkarar kunna skilja.

Etiska ráðið

§ 3. - Er Mínboks valfrítt hjá øllum?
Ein avbjóðing við lógaruppskotinum er tá um ræður persónar, ið noyðast at brúka talgilt samskifti. Eitt nú fólk, ið hava avbjóðingar við sjónini, og avbjóðingar tá um ræður at lesa, noyðast at brúka talgildar tænastur at lesa skjøl fyri sær. Sostatt er vanligt brævasamskifti einans í lítlan mun eitt veruligt alternativ hjá hesum bólkinum.

Velja tey at samskifta við vanligum brøvum, so krevur tað antin, at tey lata onnur fólk lesa skjølini við persónsupplýsingum fyri sær, ella at tey brúka appir at skanna brøvini og lesa tey fyri sær. Báðir møguleikar hava avbjóðingar. Tað er ikki torført at ímynda sær støður, har ein helst ikki vil, at onnur lesa eins persónsviðkvæmu upplýsingar. Viðvíkjandi appunum, ið skanna og lesa, so er tað ógvuliga ringt at tryggja sær, at vitanin í skjølunum verður viðgjørd/goymd á tryggan hátt.

Sostatt er tað ivasamt, hvørt hesir samfelagsbólkar hava ein veruligan valmøguleika, tá um ræður at brúka Mínboks, um tey ikki longur kunnu fáa skjøl við vanligum teldupostssamskifti. Vil ein varðveita valmøguleikan hjá hesum bólkum er spurningurin tískil, hvørt ein eigur at hyggja at einum tryggum og einfaldum máta at samskifta við teldupostum.



Aðrir bólkar, sum kunnu hava eina avbjóðing, tá um ræður krav við um talgilt samskifti via Mínboks, er útlendingar, ið nýliga eru fluttir til Føroyar, og tí ikki hava Mínboks, fólk, ið búgva uttanlands, ikki hava Mínboks, og skulu samskifta við føroyskar myndugleikar um persónsviðkvæmar upplýsingar, og fólk, ið ikki skilja tey mál, ið ein kann nýta til Mínboks.

Tískil er nógv, ið bendir á, at tað hevði verið rættast, at ikki hava eitt avgjørt forboð móti teldupostssamskifti – tó at hetta má vigast upp ímóti hvørt ein kann gera tað á tryggan hátt.

Fíggjarmálaráðið:

Miðað verður eftir, at Mínboks er ein loysn, ið kann verða nýtt einum so breiðum skara sum gjørligt. Hetta verður t.d. gjørt við, at Vangin brúkar UserWay, ið er ein hjálp til sjónveik (forstørra tekstin), lesiveik (upplestur), farvublind (litsamanseting) og annað. Loysnin er eisini kompatibel við mest vanligu hjálpiamboðini, ið ymisku bólkarnir vanliga brúka á teirra telefonunum, t.d. Jaws til upplestur.

Mínboks hevur eisini fulltrú loysn, har ein kann lata seg umboða av øðrum. Hetta er loysn í stórt fokus er á og skal betrast komandi tíðina.

Útlendingar, ið flyta til Føroyar, kunnu so skjótt teir hava fingið p-tal eisini fáa Mínboks. Mínboks er eisini á enskum, og mett verður, at tað tískil eru sera fá, ið ikki kunnu nýta Mínboks vegna málsligar forðingar.

§ 3. stk. 2 – aðrir portalar og WCAG

Ein avbjóðing við § 3 stk. 2 er, at hetta letur upp fyri, at tað almenna veitir trúnaðar og persónsviðkvæmar upplýsingar á pallum, sum ikki fylgja WCAG. Viðmerkingarnar til lógaruppskotið gera tíbetur nógv burturúr, at Mínboks skal fylgja WCAG. Hinvegin stendur ongastaðni í viðmerkingunum, at aðrir portalar, sum fylgja krøvunum í § 3. stk. 2, skulu fylgja WCAG. Tískil er vandi fyri, at teir samfelagsbólkar, ið hava tørv á WCAG, ikki kunnu brúka teir portalarnar.

Í hesum sambandi eigur ein eisini at hava krav um, at tær heimasíðurnar, har portalarnir liggja á, eiga at fylgja WCAG. Fylgja bara portalarnir sjálvir WCAG so kann ein enda í eini støðu, har portalarnir eru lættir at brúka, men tað ber ikki til hjá fólki, at brúka lesarar ella onnur tól, at koma fram til portalin.

Fíggjarmálaráðið:

Tikið verður undir við, at portalarnir eiga at fylgja WCAG. Stór orka verður løgd í, at Vangin fylgir WCAG krøvunum.

Kravið í § 3, stk. 2 um, at almennir stovnar skulu samskifta umvegis Mínboks, tá tey senda viðkvæmar persónsupplýsingar ella trúnaðarupplýsingar talgilt til síni viðskiftafólk, er strika úr lógaruppskotinum, av tí at hoyringssvarini vístu, at tíðin var ikki búgvin til at seta hetta í verk.

Web Content Accessibility Guidelines

Sum sagt er tað gott, at lógaruppskotið krevur, at Mínboks fylgir WCAG. Tó eru tað tvey ting, sum kunnu betrast.

WCAG er dagført fleiri ferðir, og tískil eru eisini ymiskar útgávur av WCAG. So hvørt tøknin broytist og so hvørt, sum ein leggur merki til, at har eru manglar, ella ting, ið kunnu betrast við WCAG, so verða krøvini eisini dagførd. Í løtuni er nýggjasta WCAG útgávan WCAG 3. Tað hevði tí verið best, um ein gjørdi greitt, at tað er WCAG 3 ein skal nýta, og at so hvørt nýggj krøv koma, so eigur ein eisini at fylgja teimum.

Ein onnur avbjóðing er, at sum vit skilja tað, so sigur ein longu nú, at Mínboks er atkomulig. Vit hava samskift við áhugafeløg og ráðgeva innan økið, og sum er eru manglar við Mínboks, ið gera, at Mínboks ikki riggar nóg væl hjá teimum bólkum, ið WCAG skal hjálpa. Tí er tað av alstórum týdningi, at hesir manglar koma uppá pláss, áðrenn lógin fær gildi.

Spurningurin er eisini, hvørt tað ikki er rættast, at kravið um atkomuligheit fyri fólk, ið kunnu hava avbjóðingar, verður nevnt ítøkiliga í lógini, og ikki bara í viðmerkingunum.

Fíggjarmálaráðið:

Heldur enn at seta hetta inn í hesa løgtingslóg um Mínboks, so átti tað at verið nágreina nærri, um ikki skilabetri hevði verið, at smíða lóg um atkomu fyri allar borgarar til almennar heimasíður og appir. Fyri at WCAG skal virka í praksis er neyðugt við serkønum fólki til at vegleiða um hetta umframt at eftirlit má verða við um heimasíður og app liva upp til krøvini.

Eitt av átøkunum (átak 14.) í nýggju heildarætlanini hjá Talgildu Føroyum[1] *er, talgild inklusjón og menning og sigur:*

"Fyri at tryggja at talgildingin verður fyri øll verður arbeitt á hesum mótum:

Talgild atkoma: Talgild atkoma fevnir um meginreglur og tøkni, sum talgildar heimasíður, appir og aðrar loysnir skulu lúka. Tá ið vit menna loysnir við talgildari atkomu, tryggja vit, at brúkarar, ið hava avbjóðingar við t.d. sjón, hoyrn, rørslu, minni og farvu- og orðblindni, kunnu luttaka í samfelagnum á jøvnum føti við onnur.

[1] https://www.talgildu.fo/talgildu-foroyar/a-breddanum/nyggj-heildaraetlan-talgildingin-av-samfelagnum-heldur-fram/

§ 5. - Nær postur er móttikin

Eitt ivamál, sum viðmerkingarnar til § 5 kunnu fáa greiðari, er um har er ein støða, har boðini eru komin fram á Mínboks, og sostatt eru atkomandi, men ein feilur í skipanini ger, at móttakarin hevur grundaða orsøk at halda, at eingin boð eru komin. Hetta er serliga um ein hevur skrivað seg upp, at fáa boð á teldupostin hjá sær, hvørjaferð eini boð eru komin á Mínboks, men ein so av onkrari orsøk ikki móttekur ein teldupost um at boð eru komin. Boðini liggja á Mínboks og eru atkomandi, men ein feilur í skipanini hjá Mínboks kann tá gera, at ein ikki fær nakra notifikatión, og tí ikki fer inn á Mínboks at hyggja. Er hetta tá ein feilur í skipanini, sum ger at t.d. ein kærufreist ikki eigur at telja frá tá, at boðini liggja á Mínboks, ella liggur ábyrgdin altíð á móttakaranum, bara boðini eru komin fram í Mínboks?

Fíggjarmálaráðið:

Teldupost fráboðanin er eitt eyka hjálpiamboð, men tað er framvegis ábyrgdin hjá móttakaranum at kanna sín post í Mínboks. Lógaruppskotið ásetur, at boðini eru komin fram, tá boðini eru atkomulig í Mínboks.

Heilsumálaráðið og Landssjúkrahúsið

Fyri tær 34 kommunulæknaviðtalurnar svarar hetta til ein samlaðan kostna á 544.000 kr. Fyri 37 kommunulæknaviðtalur verður samlaði kostnaðurin 592.000 kr. Haraftrat koma útreiðslur til nýtslugjald fyri hvørt bræv, ið verður sent ella móttikið. Hesum kann Heilsumálaráðið ikki taka undir við.

Heilsumálaráðið skal harumframt vísa á, at gjøld, so sum nýtslugjøld, eiga at hava heimild í løgtingslóg vísandi til 3.5. skattir, avgjøld og gjøld í rundskriv um lógarsmíð. Heilsumálaráðið heldur, at ein áseting um gjald eigur at setast í lógaruppskotið, undir hesum at gjaldið verður prístalsjavnað. Heilsumálaráðið skal eisini vísa á, at gjaldið ikki eigur vera hægri enn útreiðslurnar, sum eru av virkseminum at knýta almennir stovnar ella løgfrøðiligir persónar í Mínboks.

Fíggjarmálaráðið:

Kravið í § 3, stk. 2 um, at almennir stovnar skulu samskifta umvegis Mínboks, tá tey senda viðkvæmar persónsupplýsingar ella trúnaðarupplýsingar talgilt til síni viðskiftafólk, er strika úr lógaruppskotinum, av tí at hoyringssvarini vístu, at tíðin var ikki búgvin til at seta hetta í verk.

Talgildu Føroyar vilja tó fegin taka upp samskifti við Heilsumálaráðið um, hvussu avtala kundi verið sett saman, ið kann fevna um Mínboks atgongd til allar kommunulæknaviðtalurnar.

Uppskotið leggur upp til, at tað er sjálvboðið hjá likamligum persónum at tekna seg til Mínboks. Harumframt leggur uppskotið upp til, at almennir myndugleikar skulu samskifta umvegis Mínboks í ávísum førum í samsvari við grein 3, stk. 2. Víst verður á, at tá ein likamligur persónur ikki er teknaður til Mínboks, hevur ein almennur myndugleiki ikki møguleika at samskifta umvegis Mínboks við persónin. Er ætlanin í tílíkum støðum, at almenni myndugleikin skal nýta vanligan post, og ikki teldupost, verður mælt til at hetta gerst greitt í uppskotinum.

Fíggjarmálaráðið:

Kravið í § 3, stk. 2 um, at almennir stovnar skulu samskifta umvegis Mínboks, tá tey senda viðkvæmar persónsupplýsingar ella trúnaðarupplýsingar talgilt til síni viðskiftafólk, er strika úr lógaruppskotinum, av tí at hoyringssvarini vístu, at tíðin var ikki búgvin til at seta hetta í verk.

Uppskotið leggur upp til, at upplýsingar, sendar í Mínboks roknast sum komnar fram, ta løtu upplýsingarnar eru atkomandi fyri móttakaran. Hetta kann føra við sær, at ávísir samfelagsbólkar, til dømis eldri fólk ella útlendingar, ið ikki eru sterk innan talgilda heimin ella føroysk viðurskifti, missa rættin at kæra ella annað grundað á, at tey ikki hava sæð boðini í Mínboks. Í løtuni er sum skilst gjørligt at fáa ein teldupost, ið ger vart við at persónurin hevur móttikið eitt bræv í Mínboks. Skotið verður upp at hendan tænastan verður víðkað til eisini at fevna um SMS-boð, um talan er um boð, ið persónurin skal svara uppá innan ávísa freist.

Fíggjarmálaráðið:

Umsitingin av Mínboks sær ikki innihaldið í brøvunum, tí er ikki gjørligt frá skilja ímillum brøv í innihalda freistir og ikki annað. Slík fráboðan kundi ligið uttanfyri Mínboks og komið frá skipan frá sendaranum sjálvum. Hugt verður áhaldandi eftir møguleikum at betra Mínboks og at fáa fráboðanina at fevna um SMS-boð eisini, verður tikið við sum eitt uppskot til betringar.

Víst verður á, at orðið "brúkarir" ikki verður nýtt við eintýddari merking allan vegin gjøgnum uppskotið. Í yvirskriftini omanfyri grein 3 verður orðið nýtt sum eina tilvísing til aktørarnar í §§ 3-4, tað er almennir stovnar og likamligir og løgfrøðiligir persónar. Aðra staðni í uppskotinum verður orðið nýtt sum eitt samheitið við likamligar persónar. Til dømis "Tað er ókeypis hjá brúkaranum at nýta Mínboks." Mælt verður til, at orðið brúkarir verður nýtt við einari merking í øllum uppskotinum.

Tað framgongur av uppskotinum, at Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu nýtir Mínboks. Víst verður á, at stovnurin er avtikin og fluttur undir Fólkaheilsustýrið, Landssjúkrahúsið og Granskingareindina tann 1. januar 2023.

FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF FINANCE

Fíggjarmálaráðið:

Takk fyri hesar rættingar. Viðmerkingarnar eru rættaðar tilsvarandi.

Kommunufelagið

Kommunur eru ikki almennir stovnar.

Lógaruppskotið leggur seg millum annað eftir at regulera, hvussu "almennir stovnar" leggja síni viðurskifti til rættis. Burturúr viðmerkingunum ber helst óbeinleiðis til at staðfesta, at hetta heitið eisini fevnir um kommunurnar. Hetta er somuleiðis fatanin, sum felagið hevur fingið í samskifti við Fíggjarmálaráðið. Ynskiligt hevði kortini verið, um tað varð skilmarkað meiri beinleiðis í lógaruppskotinum, at kommunur verða fevndar av lógini.

Í framhaldi av hesum skal viðmerkjast, at tað eftir okkara tykki kann føra til misskiljingar at umrøða kommunur sum "almennir stovnar". Málsliga knýtir orðingin seg til eindir undir landsstýrinum, sum kommunurnar skipanarliga ikki eru partar av. Einstøku kommunurnar hava heldur ikki stovnar undir sær, tí kommununan sum kunnugt er at meta sum eindarfyrisiting. Stovns-heitið verður sostatt ikki brúkt sum løgfrøðilig skilmarking í ella av kommunala geiranum.

Mælast kann til í staðin at brúka orðingar úr fyristitingarlógini ("allar partar av almennu fyrisitingini") ella at nevna kommunurnar beinleiðis í lógartekstinum.

Fíggjarmálaráðið:

§ 2, nr. 5, er tillaga soleiðis, at nú verða kommunur og interkommunalir felagsskapir nevndir beinleiðis í lógini.

Krav um at brúka Mínboks

Lógaruppskotið leggur upp til, at talgilt samskifti frá almennu fyrisitingini framyvir skal fara til Mínboks, tá ið talan er um viðkvæmar persónsupplýsingar ella trúnaðarupplýsingar.

Talan er um eitt nýtt krav, sum ætlandi skal setast í verk eftir skiftistíð til teirra, sum enn vanta at knýta seg í Mínboks. Onki verður tó sagt um, hvussu long hendan skiftistíðin verður og hvussu hon ætlandi skal leggjast til rættis.

Kommunurnar – eisini tær, sum longu eru knýttar Mínboks – hava sjálvsagt tørv at fáa stundir at gjøgnumganga útfarandi samskifti teirra og leggja hesa umlegging til rættis. Mælt verður tí til at rúm

tíð verður sett av saman við kommununum, Talgildu Føroyum, veitarum o.ø. at tryggja eina góða verkseting av hesum nýggja kravi.

Í sama viðfangi kann eisini vera tørvur á einum meiri yvirskipaðum kjaki millum land og kommunur um, hvussu talgildingin av Føroyum skal mennast og fíggjast frameftir. Kommunurnar hava nógv beinleiðis samskifti við borgarar, og tað er tí av stórum týdningi at tær verða hoyrdar, og at tær kunnu vera við til at raðfesta og at leggja til rættis.

Fíggjarmálaráðið:

Kravið í § 3, stk. 2 um, at almennir stovnar skulu samskifta umvegis Mínboks, tá tey senda viðkvæmar persónsupplýsingar ella trúnaðarupplýsingar talgilt til síni viðskiftafólk, er strika úr lógaruppskotinum, av tí at hoyringssvarini vístu, at tíðin var ikki búgvin til at seta hetta í verk.

Fíggjarmálaráðið tekur undir við, at tørvur er á einum meiri yvirskipaðum kjaki millum land og kommunur um, hvussu talgildingin av Føroyum skal mennast og fíggjast frameftir. Átak nr. 1 í nýggju heildarætlanini fyri Talgildu Føroyar sigur: "Í fyrstu heildarætlanini var eitt av aðalmálunum, at land, kommunur og vinna samstarvaðu um uppgávuna at talgilda samfelagið. Nú er málið at fara eitt stig longri og seta á stovn ein myndugleika, ið stendur fyri yvirskipaðu talgildingini. Skulu vit framhaldandi menna okkara vælferðarsamfelag, er neyðugt, at land og kommunur áseta ein fastan íløgukarm til talgilding, sum tryggjar støðufesti og framhaldandi menning av vælferðarsamfelagnum. Myndugleikin samstarvar við vinnuna, so alt samfelagið fær ágóðan."[2]

Slag av upplýsingum

Lógaruppskotið umrøður nøkur sløg av upplýsingum, sum framyvir bert kunnu sendast talgilt umvegis Mínboks. Talan er um eina yvirskipaða lýsing, og tað er væntandi at fleiri ítøkilig ivamál fara at standast av lógini.

Sum dømi koma kommunurnar helst at skula taka støðu til, um upplýsingar um P-tal, aldur, kontonummar, bústað, telefonnummar, teldupostadressu, hjúnastøðu, nøvn á børnum og so framvegis, eru av slíkum slagi, at teir kunnu væntast at verða hildnir í trúnaði.

Somuleiðis kunnu ivamál stinga seg upp um tey sløg av málum, sum kommunur, eldrasamstørv, barnaverndir o.o. hava til viðgerar. Er tað ein trúnaðarupplýsingur, at eitt mál er til viðgerðar, og er munur á alt eftir, hvat mál talan er um? Eru allar fyrisitingarligar avgerðir fevndar – eisini tær har til ber at geva fult alment innlit í málið?

[2] https://www.talgildu.fo/talgildu-foroyar/a-breddanum/nyggj-heildaraetlan-talgildingin-av-samfelagnum-heldur-fram/

Hetta eru ivamál, sum viðmerkingarnar í størri mun eiga at fyrireika kommunurnar til at kunna taka støðu til.

Fíggjarmálaráðið:

Kravið í § 3, stk. 2 um, at almennir stovnar skulu samskifta umvegis Mínboks, tá tey senda viðkvæmar persónsupplýsingar ella trúnaðarupplýsingar talgilt til síni viðskiftafólk, er strika úr lógaruppskotinum, av tí at hoyringssvarini vístu, at tíðin var ikki búgvin til at seta hetta í verk.

Slag av samskifti

At enda kann viðmerkjast, at okkara fatan av lógaruppskotinum er, at tað einans fevnir um útfarandi, talgilt samskifti sum inniheldur ávísar upplýsingar. Vit skilja hetta soleiðis, at ætlanin ikki er at regulera talgilda móttøku av hesum upplýsingum, og at kommunur sostatt framvegis kunnu móttaka upplýsingar umvegis teldupost, sms og aðrar talgildar miðlar.

Ynskiligt var, um greið støða var tikin til hetta í viðmerkingunum til uppskotið.

Fíggjarmálaráðið:
Kravið í § 3, stk. 2 um, at almennir stovnar skulu samskifta umvegis Mínboks, tá tey senda viðkvæmar persónsupplýsingar ella trúnaðarupplýsingar talgilt til síni viðskiftafólk, er strika úr lógaruppskotinum

KT-felagið:

§ 3, stk. 2 merkir, at Mínboks kemur at innihalda flest allar fráboðanir við viðkvomum dátum frá almennu stovnum til borgaran. Hettar ber nakrar spurningar við sær sum ikki eru viðgjørdir.

- Hvørjir váðar eru til staðar fyri at upplýsingar koma til óviðkomandi?
- Hvørjar eru avleiðingarnar?
- Hvørjar yvirskipaðar tøkniligar fyriskipanir eiga at verða framdar fyri Mínboks? M.a heldur KT-felagið, at brøvini eiga at verða bronglaði á goymsluni hjá Mínboks soleiðis, at bert borgarin kann lesa brøvini og at t.d. Mínboks umsitarar ikki kunnu lesa innihaldið í brøvunum)

Lógin áleggur løgfrøðiligum persónum at binda í Mínboks um teir hava tørv á talgildum upplýsingum frá almennum stovnum har upplýsingarnar verða mettar at vera trúnaðarupplýsingar. Men tá hentleikin ikki finst í skipanini enn, er tað ov tíðliga at áseta hesi viðurskifti í lóg.

Fíggjarmálaráðið:
Talgildu Føroyar gera áhaldandi váðagreiningar av Mínboks, undir hesum eisini hvørjar tøkniligar fyriskipanir eiga at verða framdar.

Í nýggju heildarætlanini[3] fyri Talgildu Føroyar sigur átak nr. 8: "Borgarar, vinna og tað almenna kunnu trygt og einfalt samskifta sínámillum. Hetta krevur at at lóg um almennan postkassa verður gjørd, sum javnsetur talgilda postkassan við tann, ið hongur á húsavegginum.

Mínboks skal dagførast til at kunna handfara økta samskiftið, har vinnan fær gjørt nýtslu av Mínboks, bæði sum avsendari og móttakari."

Eisini frágreiðingin hjá Vakstrarforum um KT, har KT-felagið var væl umboðað í arbeiðsbólkinum, viðmælir í átaki 9, ein talgildan postkassa til øll, har "Borgarar og vinna hava ein talgildan postkassa á Vanganum, sum ger tað lættari og tryggari at samskifta."[4]

§5. Rættarvirknaður
Til slíkan rættarvirkna eigur skipanin at brúka eitt óavvísiligt tíðarstempul fyri móttøku av brævi. Tíðarstemplið skal vera sjónligt fyri brúkaran av Mínboks og sendari eigur eisini at fáa tíðarstempli aftur frá Mínboks tá eitt bræv er sent. Hetta tykist at virka við innritan frá teldu, men ikki við appini.

Fíggjarmálaráðið:
Hetta er partur av loysnini í dag. Talgildu Føroyar taka upp samskifti við KT-felagið um at fáa hesa viðmerking útgreinaða.

§6. Persónstalið
Spurningurin um at útflýggja p-tal til løgfrøðiligar persónar fyri at lætta um teirra arbeiðið við íbinding til Mínboks, eigur at viðgerðast í breiðari høpi enn bert fyri tænastuna Mínboks. T.v.s. kann p-talið latast løgfrøðiligum persónum tí tað lættir um hjá løgfrøðiliga persóninum at fremja sítt virksemi, herundir senda brøv til Mínboks, rita inn við Samleikanum og fáa p-tal upplýst og lætta um samkoyring av egnari kundaskrá við persónsskránna hjá Landsfólkayvirlitið.?

P-talið er eyðmerkingin av einstaklinginum. KT-felagið heldur, at P-talið eigur at leysgevast, soleiðis at eisini privatar fyritøkur kunnu menna skipanir upp ímóti almenna talgilda postkassanum. Tað er eingin orskøk at bert almennir stovnar skulu hava atgongd til hetta.

[3] https://www.talgildu.fo/talgildu-foroyar/a-breddanum/nyggj-heildaraetlan-talgildingin-av-samfelagnum-heldur-fram/
[4] https://www.lms.fo/vakstrarforum/



FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF FINANCE

Fíggjarmálaráðið:
Átak 5. í nýggju Heildarætlanini fyri Talgildu Føroyar sigur:

"Privata vinnan skal, eins og almennir myndugleikar, kunna brúka P-talið sum eintýdda eyðmerking. Hetta er ein fortreyt fyri, at vinnan kann fáa størri gagn av m.a. Samleikanum, Hetta ger talgildingina tryggari og munadyggari fyri alt samfelagið."

s4. "...loysnin lýkur krøvini um trygt talgilt samskifti..." – KT-felagið heldur, at metingin eigur at vera viðløgd her. Harumframt hevur tað minst líka stóran týdning, at Mínboks hevur trygga talgilda goymslu (bronglaða goymslu)

Fíggjarmálaráðið:
Mínboks liggur í Landsnet umhvørvinum, ið verður árliga skoða eftir 27001 standardinum. Eisini verður Mínboks skipanin sjálv skoða eftir ISAE 3000 standardinum. Boðini í Mínboks ferðast umvegis Heldina, ið er tryggi samskiftispallurin, ið almennu Føroyar hava valt at nýta samsvarandi rundskrivið um Heldina.

S5 "...Mínboks skal veita trygd fyri, at samskiftið ikki verður broytt á vegnum, og at samskiftið er bronglað, so at samskiftið ikki kann lesast av óviðkomandi..." – KT-felagið vil vísa á, at tað somuleiðis hevur minst líka stóran týdning, av brøv ikki kunnu broytast meðan tey eru í goymsluni hjá Mínboks og ikki kunnu lesast av óviðkomandi, meðan tey eru í goymsluni hjá Mínboks.

Fíggjarmálaráðið:
Talgildu Føroyar gera áhaldandi váðagreiningar av Mínboks, undir hesum eisini hvørjar tøkniligar fyriskipanir eiga at verða framdar.

S5. "...Hetta merkir, at um ein sendari vil vera við, at viðkomandi ikki er sendari... so hevur sendarin prógvbyrðuna av, at viðkomandi ikki er sendarin." – KT-felagið heldur, at neyðugt er at grundgeva fyri hvørjar tøkniligar fyriskipanir eru framdar, so at hetta er eitt rímiligt krav

Fíggjarmálaráðið:
Tryggar mannagongdir í sambandi við at sendarar kobla seg á Mínboks og Heldina umframt loggar, ið Heldin førir við samskifti, ger, at eingin ivi er um, hvør sendarin er.

S6. "Fyrimunir við skipanini" – undarligt at grundgeva við at tað slepst undan at menna integratión til Samleikan og so ikki nevna at ístaðin skal ein integratión mennast til Mínboks. Harumframt er Samleikin ein hornasteinur í føroysku taldildingini og tað óskilligt at grundgivið fyri ikki at binda seg í Samleikan. Er áskoðanin at kostnaðir er ov høgir at binda seg í Samleikan, so er at seta gjaldið niður.

Fíggjarmálaráðið:
Avsnitti í víst verður til upplistar fyrimunir. Integratión í Mínboks verður nevnd undir fíggjarligar avleiðingar. Fíggjarmálaráðið tekur undir við at Samleikin er ein hornasteinur í føroysku talgildingini. Stovnar og virkir, ið nýta Mínboks, fáa gagn av Samleikanum á sama hátt sum onnur í hava eitt beinleiðis knýti í Samleikan – tað eru tó nakrar stórrakstrarfyrimunir við slíkari sentrali skipan, undir hesum ikki at gera egna integratión í Samleikan.

S7 "...Tað krevur ikki stórvegis KT kunnleika á stovnunum fyri at knýta seg í Mínboks..." –Her vil KT-felagið vísa á, at tað krevur forritanar kunnleika at sambinda egna skipan við Mínboks.

Fíggjarmálaráðið:
Hetta er rætt. Viðmerkingar eru tillagaðar.

MEGD

MEGD vil í hesum høpi gera vart við, at MEGD hevur fingið kunning um, at talgildar skipanir hjá einum ella fleiri almennum stovnum hava annað enn føroyskt mál, sum grundarlag. Hetta ger, at hjálpartól hava torført við at týða ymisku málini, eitt nú í sambandi við upplestur hjá fólki, ið hava niðursetta sjón, eru blind, lesiveik ella skriviveik.

Fíggjarmálaráðið:
Tað hava verið avbjóðingar við hjálpitólið á Vanganum, ið slær yvir til íslendskt. Arbeitt verður við, at fáa hetta rættað sum skjótast. Møguliga er tað hetta, ið MEGD ger vart við omanfyri.

Uppskotið allýsir í grein 2 hugtakið atkoma, sum tá ongar forðingar eru, ið móttakarin ikki er tann nærmasti at loysa. MEGD hevur tað fatan, at hugtakið atkoma eigur at verða allýst breidri, og ynskið er, at hetta verður tryggjað umvegis aðra lóggávu. Móttakarar, ið bera brek, kunnu, sum kunnugt, hava tørv á stuðli ella hjálpartólum, í sambandi við at nýta Mínboks. Markamótið millum tað, ið móttakarin sjálvur eigur at taka stig til, og tær talgildu skipanir, ið liggja til grundar fyri Mínboks, kunnu neyvan sundurskiljast ein einfaldan hátt, uttan at vandin økist fyri, at atkoman hjá móttakaranum verður avmarkað. Her hevði tað verið ein fyrimunur, helst fyri allar partar, brúkarar hava lættan og góðan møguleika at fráboða, tá ella um avbjóðingar standast, og at somu bólkar verða inndrignir, tá loysnir skulu finnast.

Fíggjarmálaráðið:
Viðvíkjandi hesum um forðingar við atkomu, so kann hetta samanlíknast við fysiska postin, at tað er móttakarin, ið hevur ábyrgd av, at lesa sín post, tá posturin er komin í postkassan. Tað er ógjørligt hjá sendaranum at taka ábyrgd fyri teimum hjálpitólum, ið móttakarin brúkar, fyri at koma út til fysiska postkassan. Tí er meginreglan tann, at tann sum er nærmast at loysa avbjóðingina/forðingina, er tann, ið hevur ábyrgdina at loysa hesa.

Talgildu Føroyar vilja fegin taka stig til, at práta nærri um, hvussu t.d. møguleikin at fráboða kann betrast.

MEGD hevur í hesum høpi fyrr gjørt vart við, at avbjóðingar kunnu standast í sambandi við, at talgildar loysnir eru treyt fyri atgongd til talgildar almennar og privatar skipanir hjá fólki, sum eru undir verju.

MEGD stúrir fyri, at hesi verða útihýst, tí tey ikki hava talgildan samleikan, og verji teirra ikki kann virka teirra vegna við sínum egna samleika.

Fíggjarmálaráðið:
Mínboks hevur fulltrúloysn. Hetta merkir, at ein persónur kann geva øðrum, t.d. einum verja, loyvi til, at virka vegna seg í Mínboks, tvs. at lesa og senda post hjá fulltrúgevaranum.

Talgildu Føroyar hava gjørt eina forkanning um, at gera eina størri sentrala fulltrúloysn, ið kann brúkast á fleiri talgildum tænastum. Talgildu Føroyar vilja bjóða MEGD við, so skjótt ein nærri kravfesting av størru fulltrúloysnini fer í gongd.

TAKS

Er § 3, stk. 2, einans galdandi fyri samskifti við viðskiftafólk, eins og framgongur av viðmerkingunum, so eigur hetta at standa í lógartekstinum. Hugtakið “viðskiftafólk” kann samstundis við fyrimun lýsast í § 2.

Fíggjarmálaráðið:
Kravið í § 3, stk. 2 um, at almennir stovnar skulu samskifta umvegis Mínboks, tá tey senda viðkvæmar persónsupplýsingar ella trúnaðarupplýsingar talgilt til síni viðskiftafólk, er strika úr lógaruppskotinum, av tí at hoyringssvarini vístu, at tíðin var ikki búgvin til at seta hetta í verk.

Sambært § 9, stk. 2, verður § 3, stk. 2, sett í gildi við kunngerð. TAKS mælir til, at § 3, stk. 2, ikki verður sett í gildi innan fullgóð loysn fyri samskifti við virki, herundir (tillagað) Mínboks til virki, er tikin í nýtslu. TAKS samskiftir nevniliga javnan við virki, herundir grannskoðaravirki, bókhaldsvirki og advokatskrivstovur, um viðurskifti hjá kundum teirra, og hevur TAKS til tílíkt samskifti amboð til at brongla upplýsingar um neyðugt. Tí er tað týdningarmikið, at ein kravdur, talgildur samskiftisháttur ikki verður til ampa fyri arbeiðið hjá TAKS, soleiðis at arbeiðið seinkast ella gerst truplari ella dýrari.

Fíggjarmálaráðið:
Sí svar omanfyri um, at kravið ásett í § 3, stk. 2 er strikað.

Vísindasiðseminevndin

Nevndin ivast í, um tað er skilagott at samla alt viðkvæmt talgilt samskifti við borgarar í einari og somu skipan. Lógin viðger ikki váðarnar, sum eitt slíkt monopol kann viðføra, um so er, at brek við skipanini viðføra, at óviðkomandi fáa atgongd til skjølini.

Fíggjarmálaráðið:
Kravið í § 3, stk. 2 um, at almennir stovnar skulu samskifta umvegis Mínboks, tá tey senda viðkvæmar persónsupplýsingar ella trúnaðarupplýsingar talgilt til síni viðskiftafólk, er strika úr lógaruppskotinum, av tí at hoyringssvarini vístu, at tíðin var ikki búgvin til at seta hetta í verk.

Leggjast kann tó afturat, at partur av heildarætlanini fyri Talgildu Føroyar frá 2015 var ásett, at borgarin skuldi hava eina felags inngongd til talgildar tænastur, undir hesum eisini atgongd til ein talgildan postkassa. Við at leggja Mínboks á Vangan fæst ein trygg eyðmerking við Samleikanum, trygt samskifti umvegis Heldina, innaneftirlit umframt aðrar trygdarhentleikar. Mett verður, at tað er trupult at lyfta hesa uppgávu hjá hvørjum einstøkum stovni, í mun tøka arbeiðsorku, vitan og kostna.

Sambært grein 1 so fevnir lógin bert um talgilt samskifti. Tískil gongur nevndin út frá, at tað framvegis er heimilað almennum stovnum at samskifta við borgarar við vanligum brøvum. Somuleiðis skilir nevndin grein 4 soleiðis, at borgarar frameftir, bæði tey sum ikki tekna seg til MínBoks, og tey sum longu hava teknað seg, kunnu velja at fáa sítt samskifti við vanligum posti.

Fíggjarmálaráðið:
Tað er rætt skilt, at lógin fevnir bert um talgilt samskifti. Lógaruppskotið ger tað ikki til krav, at borgarar skulu móttaka sín post í Mínboks.

Nevndin skilir ikki, hví útflýggjan av persónstali, sum nevnt í grein 6, er partur av hesi lóggávu.

Fíggjarmálaráðið:
P-talið er ein fortreyt fyri at kunna brúka Mínboks, fyri at tryggja, at boðini verða send til rættan móttakara.

Lógaruppskotið er tunt í mun til viðgerð av trygd og mannagongdum, sum viðvíkja goymslu/handfaring av skjølum. Tí ein talgild postskipan kann ongantíð beinleiðis samanberast við vanligan post. Í samband við ein talgildan postkassa er neyðugt at seta spurningar so sum, hvussu leingi vil samskiftið í Mínboks verða varðveitt? Hvør hevur atgongd til postkassarnar? Hvør sleppur til skjøl og samskifti, tá persónar eru deyðir? Ber til at sletta skjøl úr postkassanum? Hvussu tryggjar man, at viðkvæma samskiftið ímillum stovn og borgara bert verður lisið av borgaranum?

FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF FINANCE

Fíggjarmálaráðið:
Tað verður ikki mett skilagott, at skriva tekniskar ásetingar um trygd og mannagongdir í eitt lógaruppskot.

Mínboks verður áhaldandi skoða av innaneftirlitinum á Gjaldstovuni og árliga av eksternum KT-grannskoðara. Hesar skoðanir fevna eisini um trygd og mannagongdir.

Til konkretu spurningarnar:

Hvussu leingi vil samskiftið í Mínboks verða varðveitt? Postur í Mínboks verður ikki slettaður, uttan borgarin sjálvur slettar ella um biður um at fáa sín post slettaðan.

Hvør hevur atgongd til postkassarnar? Atgongd verður givin eftir least-privilege princippinum. Bert heilt fáir persónar við serligum álitis-leiklutum hava atgongd.

Hvør sleppur til skjøl og samskifti, tá persónar eru deyðir? Tá ein persónur doyr, verður Mínboks hjá viðkomandi deaktivera. Tað er møguligt at úttrekkja skjølini, men bert heilt fáir persónar við serligum álitis-leiklutum hava rættindi til at gera hetta

Ber til at sletta skjøl úr postkassanum? Ja. Brúkarin kann sjálvur sletta ella biðja um, at fáa sín post slettaðan hjá brúkaratænastuni 1881.

Hvussu tryggjar man, at viðkvæma samskiftið ímillum stovn og borgara bert verður lisið av borgaranum? Hetta verður tryggja við Samleikanum.